




*Pablo Picasso*
*Le charnier. Paris, 1944-45; Líkhúsið 1945.*
*Foto: The Museum of Modern Art, New York (MoMA)/Scala, Firenze*
*Framsýningin verður 11. februar - 29. maj 2011*

*Walton Ford, Baba-B.G., 1997*
*Akvarel, gouache, tusch og blyant á pappír 105,1 x 74 cm*
*Privat ogn, Courtesy Paul Kasmin Gallery*
*© Walton Ford, Courtesy Paul Kasmin Gallery*
*Framsýningin verður 12. november 2010 - 6. marts 2011*

## FAKTA **LOUSIANA**

**Lousiana telist millum fremstu listasøvnini við modernaðari list í heiminum. Savnið er eisini eitt livandi mentanarhús, har listin, arkitekturin og uttandura umhvørvið gevur eina hugtakandi heildarupplivíng. Eisini ein høgan heystardag.**

> Eitt listasavn skal bólgna av yvirskoti.
> *Poul Erik Tøjne, savnsleiðari*

fremstu í heiminum. Eyðkent av dygdargóðum og slóðbrótandi framsýningum og mentanarligum tiltøkum, sum festa røtur heilt aftur í hypofysuna. Serliga innan myndlist, men eisini kjak-, bókmenta- og tónleikatiltøk í heimsklassa, umframt eina stóra deild fyri børn og ung.

Listasavnið, sum lat upp í 1958, eigur omanfyri 3000 verk úr øllum heiminum. Mest málningar og standmyndir frá 1945 og fram eftir navnframum listafólkum frá Picasso til Warhol og frá Jorn til Kirkeby. Uttan um savnið er ein stórsligin standmyndapark við verkum, sum listfrøðingar hava mett um, valt út og sett inn í umhvørvið við serligum atliti til vøkru náttúruna út til Oyrasund.

### Bólgnar av yvirskoti

Umfram føstu framsýningina skipar savnið fyri 4-6 árligum serframsýningum, har dentur verður lagdur á altjóða, modernaða list.

Í summar var millum annað nýskapandi framsýning undir heitinum Warhol after Munch, har verk eftir Munch hava verið gjøgnum pressuna hjá Warhol. Lousiana eigur frammanundan størstu samlingina av verkum eftir amerikanski listaikonið Warhol í norðurlondum.

Restina av hesum árinum er serframsýning við verkum eftir týska listamannin Anselm Kiefer, og komandi ár kunnu vit millum annað gleða okkum til eitt satt Picasso-paradís í Humlebæk við framsýningini Picasso: Peace + Freedom.

Tí, sum savnsleiðarin, Poul Erik Tøjner, sigur:

– Eitt listasavn skal vera eitt ríkt stað, har tú finnur meira enn tað neyðuga. Júst hetta 'meira', sum ferð eftir ferð kemur til sjóndar, er einasta, men eisini sterkasta, prógvið um lívsneyðuga týdningin av list og mentan. Hendan kenslan av meira, annað, nýtt – sjálvt, tá tað er gamalt. Eitt dygdarsavn bólgnar av yvirskoti. Av meira av tí, sum fólk vilja hava. Av meira av tí, sum eftirspurningur er eftir beint nú.

> Hóast eg eri sjey ára gomul,
> eri eg eitt fostur í móðurlívi.
> *Barnaminni frá 70'unum*



*Árliga afturvendandi tiltakið Louisiana Literature var í síðsta mánað. Finnski høvundin Sofi Oksanen í samrøðu um skaldsøguna "Reinsan". Louisiana Museum of Modern Art, Humlebæk*
*Foto: Klaus Holsting*



*Frá framsýningini hjá Anselm Kiefer sum heldur fram til 9. januar 2011*
*Foto: Poul Buchard /Brøndum & Co*
*Louisiana Museum of Modern Art*